# Nýhugsan og útbúgvin arbeiðsmegi

**Nógv verður tosað um nýhugsan, vitanarvinnur, íverksetan o.s.fr. Londini kring okkum hava gjørt vart við hesi evnir, eins og hetta hevur verið havt frammi í sambandi við visjón 2015**

*Bogi Eliasen*
*Cand.scient.pol*



*Útbúgving er vegurin, men vinnan skal eisini hugsa meira um at brúka fólk við hægri útbúgving*

Ymiskt er hvussu hugt verður eftir hesum evnum. Men eitt er at ein partur er útbúgving, og at privati geirin í størri mun leggur seg eftir at brúka fólk við hægri útbúgving. Brúk er fyri nýhugsan, bæði fyri at loysa smærri dagligar trupulleikar, men eisini fyri at fáa verulig frambrot. Vit síggja nakrar fyritøkur brúka akademikarar, men spurningurin er, um tað ikki er størri tørvur á akademikarum í privata vinnulívinum.

### Størri vøkstur

Eitt nú í Danmark bleiv ein sonevnd akademikara kampagna gjøgnumførd í 2004 og 2005. Serligur dentur varð lagdur á at fáa akademikarar í smærri- og miðalstór virkir. Hetta er áhugavert í føroyskum høpi, tí sjálvt okkara stóru virkir eru í mesta lagi miðalstór í donskum høpi. Ein kanning (Højtuddannedes værdi for små og mellemstore virksomheder) frá 2004 vísti, at vøksturin í virkjum sum settu akademikarar í starv, var nógv størri, enn hjá teimum sum ikki gjørdu. M.a. kom fram, at virkir, sum settu akademikarar í starv frá 1995 - 2001 høvdu ein vøkstur uppá 133%, meðan vøksturin annars var 30%. Ein onnur kanning frá Ålborg Universiteti vísir, at sannlíkindini fyri at menna nýggjar vørur og/ella tænanstur er 2 til 3 ferðir størri, tá fyrsti akademikarin er settur í starv.

### Útflutningur

Ein onnur størri kanning gjørd fyri danska Erhvervs- og Boligstyrelsen, har útflutningsvirkir serliga hava stóran tørv á akademiskari vitan, m.a. tí at málsligi førleikin ikki er nøktandi, og at vitanin um mentanina í londum sum arbeitt verður við er ikki nóg góð o.s.fr..

### Føroyar

Hesar royndirnar í Danmark eru áhugaverdar, tí tær vísa at smærri og miðalstór virkir fáa nógv burturúr um tey seta fólk við hægri útbúgving. Spurningurin varð havdur uppi fyri kortum, tá m.a. Pisa kanningin elvdi til sjálvsransakan. Hjá okkum merkir tað at vinnulívið sjálvt má vilja fáa sær arbeiðsmegi við hægri útbúgving, tí tað er ein týðandi parturin í nýhugsan. Kleking og íverksetan er eitt, men vit skulu eisini leggja stóran dent á, at virkini vit hava eisini menna seg. Í Danmark hevur talan verið um meira og minni miðvísan politikk fyri at fáa smærri og miðalstóru virkini at seta akademikarar í starv, m.a. tí at talið í Danmark er lægri enn bæði í Svøríki og Noregi, og tí at ov lítið fekst burturúr teim akademikarum, sum landið brúkti orku uppá at útbúgva.

### Meirvirði

Tí er tað eisini ein spurningurin, um tað skal gerast partur í komandi vinnupolikkinum at fáa fleiri við hægri útbúgving í vinnulívið. Í hvussu so er, er tað ein spurningur, har bæði vinnan og politiska skipanin hava ábyrgdina at samstarva um. Men hetta nertir eisini við spurningin um lønir, sum var nógv á lofti herfyri, tí Dávid Reinert Hansen fær løn fyri starv í fleiri tunlum. Eg royndi tá í grein at vísa á, at hugt skal verða eftir um viðkomandi førir meira virði til virkið, enn hann kostar. Tað er tann vegin vit mugu hugsa, um vit vilja leggja okkum eftir nýhugsan. Omanfyri nevnda kanningin vísir, at ein akademikari í smærri ella miðalstórum virki veitir nógv meira í virði, enn hann kostar, og tí er tað ein góður leistur, sum kann menna fyritøkuna. So jú, vit skulu hava íverksetan, men vit skulu eisini minnast til, at vit skulu betra um viðurskiftini hjá teimum fyritøkunum vit hava, og her er hugskotið at brúka akademikara r meira kreativt avgjørt ein leistur hugsast skal um.




Vika 24 2006

# ECB hækkaði rentuna

**MARKNAÐARRÁK**

Hósdagin í farnu viku hevði evropiski miðbankin, ECB, rentufund. Tey hækkaðu stuttu rentuna 0,25% í 2,75%. Hetta var júst sum íleggjarar væntaðu. Tískil ávirkaði hetta ikki longru lánsbrævarenturnar nakað serligt. Eftir rentufundin var tíðindafundur. Tá sást hvussu stóran týdning til dømis ein miðbankastjóri kann hava fyri fíggjarmarknaðirnar. Vit hava fyrr nevnt, hvussu marknaðirnir sótu undir hvørjum orði hjá fyrrverandi amerikanska tjóðbankastjóranum, Greenspan. Hesuferð var tað Trichet sum átti tørn. Sjálvt um ECB hækkaði stuttu rentuna, var úrslitið eftir tíðindafundin, at lánsbrævarenturnar lækkaðu um 0,05%. Hetta hendi, tí íleggjarar mettu, at Trichet á tíðindafundinum ljóðaði eitt sindur minni ágrýtin at halda áfram við fleiri rentuhækkingum júst nú. Hetta styrkti eisini dollaran úr 1,28 í 1,265 í mun til evruna.

### Lánsbrævarentur lækka

Seinastu tíðina hava vit væntað at rentan fór at lækka eitt sindur. Hesa farnu vikuna er danska 10-ára rentan lækkað 0,10% til 3,93%. Útlit eru fyri, at hon lækkar nakað aftrat hesa komandi vikuna.

### Partabrøv lækka enn

Partabrøv um allan heim eru lækkað hesa farnu vikuna. Marknaðirnir hava tó verið rættiliga skiftandi, við bæði stórum lækkingum og hækkingum einstakar dagar. Enn eru eingi greið tekin um, at marknaðirnir av álvara fara at hækka aftur júst nú. Roknskapirnir hjá virkjunum vísa tó, at tey vinna væl av peningi. Tað er eisini munur á marknaðum. Til dømis hevur íslendski marknaðurin klárað seg sera væl í mun til restina av heiminum hendan seinasta mánaðin.

### Hesa vikuna

Hendan komandi vikan verður sera týdningarmikil á fíggjarmarknaðunum. Orsøkin er, at tað koma prísvakstrartøl úr bæði Evropa og USA. Sum nevnt omanfyri leggja marknaðirnir sera stóran dent á miðbankarnar í løtuni, og um prísvakstrartølini ikki gerast sum væntað, fer tað at ávirka bæði láns- og partabrøv.§§

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 589,88 | 2,2% | ↑ |
| JPY | 5,18 | 0,2% | ↑ |
| GBP | 1.085,75 | -0,1% | ↓ |
| NOK | 95,57 | -0,4% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 97,53 | 0,0% | → |
| | | | |
| Norrøn Partabrøv | 106,37 | -4,3% | ↓ |
| | | | |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*